Telefon: 311820 Fax: 314720 E-mail: post@sosialurin.fo

## Ríkmaður á ferð í rúmdini

Á FERÐ. Ein amerikanskur ríkmaður fer at gjalda 160 milliónir krónur fyri eina 10 daga langa ferð í rúmdini. 59 ára gamli Dennis Tito, sum sigst eiga virði fyri tvær milliardir krónur, ætlar at brúka ein part av sín ogn til at gerast fyrsti ferðamaðurin í rúmdini.

Tað er felagið MirCorp, sum fer at senda ríkmannin á feriu í rúmdini. MirCorp hevur gjørt avtalu við russarar um, at teir kunnu nýta rúmdarstøðina Mir, tá teir fara at senda ferðafólk út í rúmdina. Ætlanin var annars, at rúmdarstøðin skuldi niðurleggjast, men eftir avtaluna millum amerikumenn og russar, hava tveir russiskir kosmonautar verið á Mir og gjørt ymsar umvælingar har.

Dennis Tito hevur veirð granskari hjá NASA, men síðani 1973 hevur hann havt sítt egna íløgufelag. Og tað er gjøgnum inntøkurnar frá hesum íløgufelagnum, at hann nú hevur ráð at fara á ferð í rúmdini. Ætlanin er, at ferðin skal gerast einaferð næsta ár.

## Sjokkávaringar ímóti royking



ROYKUR. Fær ES eitt nýtt direktiv ígjøgnum, kunnu roykjarar vænta at síggja nýggjar og meira ógvusligar ávaringar á sigarettpakkunum framyvir.

Myndir av brendum tonnum og svørtum lungum vera kanska nýggja sjokkávaringin ímóti royking, og fær ES sín vilja fara 40% av sigarettpakkunum framyvir at verða prýddir við ávaringum. Í løtuni er kravið, at í minsta lagi 4% av pakkunum er merkt við ávaring ímóti heilsuvandunum, sum stendst av royking.

- Um veruligar myndir av brendum tonnum og svørtum lungum kunnu sannføra fólk um vandan við royking, so mæli eg til, at hesar ávaringar verða prentaða í litum á allar sigarettpakkar í Bretlandi, sigur heilupolitiski orðførarin hjá bretska Labour-flokkinum, Catherine Stihler.

ES-Parlamentið viðger nú uppskotið, og ein av fylgjunum av nýggja direktivinum kann eisini vera, at merkingar sum light og ultralight verða bannaðar.

## Halda at vatn finst á Mars

GRANSKING. Tað finnist vant á Mars, meta granskarar hjá amerikanska felagsskapinum NASA.

Hetta er komið fram, eftir at ein rúmdarkanningarfar, sum er í ringrás um reyðu gongustjørnuna, hevur tikið myndir sum vísa, at vatn kemur úr undirgrundini.

Er tað rætt, sum myndirnar vísa, fer hetta at kollvelta metingina av gongustjørnuni og skapa nýggjar møguleikar fyri at gera kanningarferðir til Mars.

Granskarar halda annars, at góð prógv er um, at vatn hevur verið á Mars í fortíðini, men tað hevur verið hildið fyri vist, at atmosferan kring Mars hevur verið so tunn, at hon hevur ikki klárað at hildið vatninum…

Men nú vísa nýggju myndirnhjá NASA nakað annað.

**Subject:** Teldubræv
**Date:** Wed, 14 Jun 2000
**To:** post@sosialurin.fo
**From:** info@nordinst.aland.fi
**Reply to:** info@nordinst.aland.fi

TELDU-POSTURIN

# Einglabørnini á bygd?

Í teimum smáu bygdakommunum eru tær sosialu umstøðurnar so tryggar og góðar og sambandið við familju og nærumhvørvi so gott, at har eru eingir trupulleikar av rúsdrekka og ólevnaði. Í stórbýnum Mariehamn harafturímóti er ungdómurin rótleysur og forsømdur, og tey ungu drekka og roykja illa, og har er tað at ungdómurin spillist og kemur sær út í sosialt óføri.

Hetta hevur verið ein sera fastgrógvin uppfatan her á Álandi, og nógvar eru tær familjurnar sum hava keypt sær hús "úti á landinum" júst fyri at børnini skuldu fáa tann trygga sosiala uppvøksturin, sum er at finna uttan fyri "stórbýin". Ongum hevur komið til hugs at seta spurnartekin við hesa sjálvsøgdu mynd, enn minni kanna um hon hevur hald í veruleikanum.

Men nú í málið fyri fyrstu ferð er kannað er "sannleikin" vendur á høvdið. Tað vísir seg at myndin er beint tvørturímóti: Tað er á bygd, ið tey drekka og roykja mest og byrja yngst at vera seksuelt aktiv. Meðan tann "fordervaði" ungdómurin í býnum er nógv meira afturhaldandi hvat viðvíkur øllum hesum syndum.

Hetta er komið fram í eini spurnarkanning, sum var almannakunngjörd í dag, og sum byggir á upplýsingar frá 93,3% av øllum skúlanæmingum frá 7.-9. flokki á Álandi. "17 spurningar til lívið" er heitið á kanningini, og spurningarnir verða settir øllum skúlanæmingum á áðurnevnda skúlastigi umleið annað til triðja hvørt ár. Endamálið er, at fáa eina mynd av hvat rørir seg millum ungfólk á Álandi.

Hetta varð fjórðu ferð kanningin varð gjørd, men fyrstu ferð hon varð løgd soleiðis til rættis, at til bar at sundurgreina munirnar millum ymiskar partar av oyggjunum.

Tomas Lundberg, leiðari fyri sosialu umsitingini hjá álendska landsstýrinum sigur, at á næstan øllum økjum eru tølini hægri fyri ungdómin "á landinum" en fyri ungdómin í Mariehamn. (Viðmerkjast skal, at Mariehamn við 10 500 íbúgvum er einasti veruligi býur í øllum Álandi, hvørs samlaða íbúgvaratal er 25 000.) Til dømis hava 37,5% av dreingjunum á bygd, sum ganga í sjeynda flokki onkuntíð verið fullir. Sama tal í Mariehamn er 21,3%.

Serliga genturnar á bygd "liva vilt". 31% av bygdagentunum siga seg nýta rúsdrekka eina til tvær ferðir um mánaðin, meðan talið fyri (Mariu-) havnargenturnar er 22%. Av gentunum í sjeynda flokki á bygd siga 17% seg hava havt sína fyrstu samlegu, men bert 5% av sjeynda floksgentunum í Mariehamn hava tikið hetta álvarsliga stigið.

Bæði leiðarin fyri álendsku sosialumsitingini og leiðarin fyri kommunala ungdómsvirkseminum í Mariehamn hava eina greiða ábending um, hví tølini síggja út sum tey gera.

Helena Wachiovak, ið arbeiðir innan ungdómsfyrisitingina í Mariehamn, heldur at tølini í Mariehamn síggja betur út enn á bygd takkað verið tí umfatandi og vælskipaða ungdómsvirkseminum í býnum og einum kommunalum ungdómshúsi, sum hevur sera gott samband við sínar brúkarar.

Tomas Lundberg, sosialstjóri í Landsstýrinum, heldur at tey drekka og roykja meira á bygd, tí at tey onki skilabetri vita sær at gera. Tað er ein sannroynd, at tær smærru kommunarnar gera lítið við at skapa frítíðartilboð til tey ungu.

"Vit vita, at tey ið byrja ung at drekka hava trupult við at tálma rúsdrekkanýtslu síni, tá tey gerast vaksin, og tey eru soleiðis í størri vanda fyri at gerast misnýtarar. Gerast tey misnýtarar kostar tað samfelagnum munandi meira enn tað kostar at reka eitt ungdómshús."

Tað sigst, at Niels Juul Arge einaferð í eini útvarpssamrøðu spurdi ein gamlan mann á útoyggj í Føroyum, hvat fólk plagdu at fáa tíðina at ganga við, tá tey ikki arbeiddu: "Vit spæla kort og smám.gga", var svarið. Tað er einki nýtt at keðsemi á smáplássum ofta er vissari leið í syndina enn ólevnaðurin í "stórbýum".

At enda skal sigast, at kanningin eisini vísti positiv úrslit. Eitt nú at álendskur ungdómur nýtir munandi minni narkotika enn ungdómur í Svøríki og Finlandi, og at ungdómurin á Álandi yvirhøvur trívist betur og hevur størri álit á framtíðina enn javnaldrarnir í teimum báðum stóru grannalondunum. Bert 4% av álendsku ungdómunum søgdu seg trívast "ikki so væl" ella illa.

**Mikkjal Helmsdal, Mariehamn**



## FØÐINGAR



30. mai fingu Joan Bech og Páll Veihe, Porkeri, ein son. Hann var 41,5 cm. langur og vigaði 1505 gr.

6. juni fingu Elbjørg og Herman Johannesen, Klaksvík, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 4100 gr.

13. juni fingu Jóhanna og Jónhard Petersen, Toftir, eina dóttir. Hon var 44 cm. long og vigaði 2235 gr.

15. juni fingu Ranvør Wolles og Páll Isholm, Odense, eina dóttir. Hon var 54 cm. long og vigaði 3870 gr.

15. juni fingu Hanna Ziskason Hansen og Torbjørn Hansen, Klaksvík, eina dóttir. Hon var 51 cm. long og vigaði 3600 gr.

16. juni fingu Jensa og Jákup Marnar Anthoniussen, Klaksvík, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 4100 gr.

17. juni fingu Elsebeth Andreasen og Heri Joensen, Tórshavn, eina dóttir. Hon var 57 cm. long og vigaði 4000 gr.

18. juni fingu Sanna og Poul Juul Festirstein, Eiði, eina dóttir. Hon var 55 cm. long og vigaði 4500 gr.

19. juni fingu Petur Jørgin og Hanna Sivertsen, Klaksvík, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 3750 gr.

19. juni fingu Helena Midjord og Dánjal Pauli Bech, Porkeri, ein son. Hann var 47 cm. langur og vigaði 2670 gr.

20. juni fingu Óluva Justinussen og Jógvan Horn, Rødovre eina dóttir. Hon var 52 cm. long og vigaði 3560 gr.

21. juni fingu Tórun Ragnarsdóttir Andreasen og Øssuer Andreasen, Tórshavn, eina dóttir. Hon var 53 cm. long og vigaði 3500 gr.

21. juni fingu Linda Apalne sog Jógvan Hugo Gardar, Oslo, ein son og Helge ein lítlabeiggja. Hann var 51 cm. langur og vigaði 3900 gr.

21. juni fingu Eyð og Martin A. Hansen, Vestmanna, eina dóttir. Hon var 51 cm. long og vigaði 3100 gr.

## ANDLÁT



15. juni
**Bjørghild Holm,** Nólsoy, vanliga nevnd Diddan, 69 ár
**Anna Johannesen,** Húsavík, 92 ár
**Vagn Olsen,** Tórshavn, 44 ár
17. juni
**Jógvan í Nýggistovu,** Sørvágur, 88 ár
18. juni
**Greta Joensen,** í Innistovu, Viðareiði, 91 ár
**Erling Hosvdal,** Hovi, 66 ár
**Jákup Matras,** Gjógv, 70 ár
20. juni
**Svend Vilhelmsen,** Tórshavn, 89 ár
**Fredrik William Cook,** Freddy, Tórshavn, 57 ár
**Johan Martin Nielsen,** Trongisvágur, 58 ár

## Eitt ljós á gøtu míni



***1. Tim 6.6:***
*Gudsóttin saman við nøgdsemi er mikil vinningur.*

Samanbera vit okkara tíð við tíðina hjá forfedrum okkara, so er hendur ein stórur framburður á mongum økjum hesi seinastu árini t.e. í okkara tíð. Fleiri tól og amboð, sum gera alt lættari at arbeiða – verði seg inni í køkinum ella úti á bønum, tól, sum ganga við ravmagn og maskinorku, sera hent tól, sum vit í dag illa kunnu vera fyri uttan. Í samferðsluni t.d. hevur stórur framburður verið bara í okkara tíð. Áður mátti ein brúka nógva tíð fyri at koma úr eini bygd í aðra, tí ein skuldi fara til gongu, í einstøkum førum møguliga á hestbaki. Nú setur tú teg í ein bil og fáar minuttir seinri ert tú komin til aðra bygd, sum tú áður skuldi brúka fleiri tímar um. Bilurin er sera hentur og neyðugur at flyta fólk og viðføri og lættir sostatt nógv um. Vit eru mong, sum helda okkum ikki kunna vera hann fyriuttan. Ein stórur framburður er í honum, mikil vinningur í mun til áður. Vit hava kanska eisini hildið, at allur hesin framburður førdi til meira tryggleika, og tað er so í fleiri førum; men so megu vit ásanna við hvørt, at ikki er nóg trygt hvørki í bilferðslu, flogferðslu ella skipaferðslu. Sannast má, at framburðurin hevur ein umkostnað og her hugsi eg um mannalív.

Tilvera okkara er nú so, at vit sleppa ikki undan óhappum og øðrum, sum rakar okkum og er okkum at meini. Ein má viðganga, at ófatiligt er at verða so hart raktur sum summi verða. Hvat er til ráða at taka?

Gomlu ráðini í nevnda bíbilorði um guðsótta og nøgdsemi hava so mangan staðið sína roynd. Vit kenna og vita um ein veg at fara í slíkum førum sum í øðrum viðurskiftum – sum orðið gudsótti ber boð um – í áliti á Gud at bera okkara sorg og svára miss fram fyri Gud í bøn og leggja okkum sjálvi og okkara kæru og okkara søk í hansara hendur og fáa styrk og lívsmót frá honum. Hann sær okkum, hann er hjá okkum. Hann hjálpir. Vit duga ikki so væl sjálvi at meta um, hvat okkum er at gagni, tí er best at lata alt upp í hendurnar á faðir okkara á himni og lata hann fáa loyvi til at bera okkum ígjøgnum alt tað svára og tunga.

Bíbilorðið knýtir síðani gudsótta og nøgdsemi saman. Vit halda tað vera torført at vera nøgdur og tala um nøgdsemi, tá ið alt er so trupult og nógv er at dragast við. Men gudsóttin fær okkum at síggja og sanna at nógv er at gleðast um og at nógv hava vit fingið til gávu, lívið sjálvt, vinfólk, sum eru okkum til mikla signing og troyst. Fær okkum at leggja merki til alt tað vakra og góða, sum eisini er, øll tey ríku upplivilsir sum vit hava haft higartil.

Best fyri okkum og størsti vinningurin er fyri okkum sum fyri Paulus, lívið í Kristusi við vón og Guds friði í hjarta og einum ævinleika saman við frelsara okkara í Guds ævigu bústaðum.

*Høgni Poulsen*

## KIRKJUR & SAMKOMUR

### 1. sunnudagur eftir Trinitatis

*Havnar kirkja:* kl. 11, altarg., skriftamál kl. 10.40, Bjarni Bæk
*Christianskirkjan:* kl. 11, Niels Pauli Danielsen
*Vesturkirkjan:* kl. 11, Heri Joensen
*Kirkjubøur:* kl. 12.15, Heri Joensen
*Argir:* kl. 11, Bergur D. Joensen. (Mongolbólkurin er við)
*Gøtu:* kl. 11,
*Æðuvík:* kl. 17, Jónsvein Bech
*Hvannasund:* kl. 12, altarg., Meinhard Bjartalíð
*Leirvík:* kl. 11, altarg.,
*Funningsfjørður:* kl. 16, altarg., Uni Næs
*Fámjin:* kl. 11,
*Øravík:* kl. 12.15, P. M. Rasmussen
*Skála:* kl. 11, altarg., Jógvan Fríðriksson
*Dalur:* kl. 12, altarg., Jákup R. Hansen
*Haldarsvík:* kl. 11,
*Tjørnuvík:* kl. 12, Marjun Bæk

### Ebenezer

Sunnudagin kl. 18 talar Ron Young, trúboðari í Albania, sum hevur hjálpt Kosovo-Albanum bæði í Albania og Kosovo. Kl. 21 útimøti.

### Hvítusunnusamkoman Yviri við Strond

Morgunmøti kl. 11, kl. 18 evangeliskt møti.

### Filadelfia, Landavegur 22

Í dag kl. 06 morgunbøn, kl. 17 landsbøn, í morgin kl. 06 morgunbøn, kl. 11 morgungudstænasta, kl. 18 møti, Edna og Arne Kallevik tala og syngja, kl. 22 útimøti (um viðrar).

Mánadagin kl. 06 morgunbøn, kl. 20 bønarskúlin.

### Kirkju- og missiónshúsið á Argjum

Sunnukvøldið kl. 18 møti við Sylverius Jacobsen.

### Frelsunarherurin Tórshavn

Leygardagin kl. 11 útimøti.

Sunnudagin kl. 11 møti, major Inger Sofie Tjåland talar, kl. 18 møti við Palla Petersen.

### Meinigheitin í Hoyvík

Sunnudagin í Hoyvíkar skúla kl. 17.30 bøn, kl. 18 møti við Sunnivu og Hans Jacob. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Rhema á Hálsi

Sunnudagin kl. 11 møti og sunnudagsskúli. Morgunbøn mánadag til fríggjadag kl. 06. Øll eru vælkomin.

### Meinigheitshúsið í Havn

Sunnudagin kl. 18 møti við Andrass Arge. Gittit syngur.

Týsdagin kl. 20 Bíbliutími. Jóh. ev.kap. 18 v. 28-40.

### KFUM og KFUK í Havn

Mánadagin kl. 15 í KFUK: Eldrasamkoma við Niels Jacob Nielsen, trúboðara.

### Kirkjan, Norðskála

Sunnudagsskúli verður sunnudagin kl. 14.30. Hetta er seinasta ferð áðrenn summarsteðgin. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Karmel, Eiði

Sunnudagin kl. 14.30 sunnudagsskúli og møti kl. 19 við Hans Johannesen (Hassi) og Katrin Hansen. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Missións- og ungdómshúsið á Glyvrum

Møti verður sunnudagin kl. 19, Alfred Olsen talar yvir evnið »Hin kristna vónin«. Øll eru vælkomin.

### Ørkin, Saltangará

Møti verður sunnudagin kl. 19 í Arbeiðsmannafelagshúsinum Hæddini í Saltangará við Gulak Hansen, Tjørnuvík o.ø.

Týsdagin kl. 20 húsmøti hjá Irenu Bech, Skipanes.

Hósdagin kl. 20 bønarmøti.

Morgunbøn er mánamorgun, mikumorgun og fríggjamorgun frá kl. 6-7.

### Keldan, Skálafirði

Mikudagin kl. 20 evangeliseringsseminar og bøn. Leygardagin opið hús kl. 21.

Sunnudagin kl. 19 møti við Jan Jacobsen og Osbjørn Joensen. http://www.keldan.fo

### Missiónshúsið í Skopun

Sunnudagin kl. 14 seinasti sunnudagsskúlin áðrenn summarfrítíðina, kl. 18.30 lovsangur, kl. 19 møti, innsavnan til húsið, felagskórið syngur.

Mikudagin kl. 20 bíbliutími.

### Missiónshúsið á Tvøroyri

Sunnukvøldið kl. 18 møti við Kára og Helenu.

Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Betel, Vágur

Sunnudagin kl. 11 breyðbróting, kl. 13.30 sunnudagsskúli, kl. 18 evangel. fundur, kl. 21 útifundur.

Mánadagin kl. 20 bønarfundur.

Ónsdagin kl. 20 uppbygg. fundur.

### Samkoman, Sion Vági

Sunnudag: Morgunmøti kl. 11.00, kl. 11.30: Sunnudagsskúli. Evangeliskt møti kl. 18.00.

Telefonandaktin svarar á 373777.

### 1000-ára haldið

Í sambandi við Jóan-søkuna verður framsýningin hjá J. P. Gregoriussen, arkitekti um kirkurnar í Føroyum í skúlanum í Vági frá 23.-30. juni.

### Føroysk gudstænasta í Reykjavík

Sunnudagin 25. juni kl. 14 verður føroysk gudstænasta í Háteigiskirkju í Reykjavík. Tað er Martin Restorff Jacobsen, prestur í Hvalvík, sum talar.

## 80 ár

**Sunnudagin 25. juni verður Sanna Johannessen í Æðuvík 80 ár.**

## Læknavaktir

**Tórshavn:**
*Læknavaktin* tlf. 310033.

**Eysturoy:**
*Leygardagin 24.6.:*
Sverri Lamhauge, tlf. 448016
*Sunnudagin 25.6.:*
Pól Jóhs. í Horni, tlf. 444038

**Norðoyggjar:**
*Leygardagin og sunnudagin:*
Jens Nylander Madsen, tls. 455045

**Vágar:** tlf. 332413

**Suðuroy (norður):**
Tlf. 371560

**Suðuroy (suður):**
Tlf. 373030

**Tannlæknavakt,** Tórshavn

Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 13–14. Tlf. 314544.